

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 12 - 2012

# Føroysku oljufeløgini við í Norra

Nú freistin at taka lut í 22. útbjóðingini á norska landgrunninum er farin eru bæði tey føroysku oljufeløgini við, Faroe Petroleum og Atlantic Petroleum. Faroe Petroleum hevur verið við áður, men hetta er so fyrstu ferð, at Atlantic Petroleum er við í eini útbjóðing í Norra. Tilsamans 36 oljufeløg hava søkt um at leita eftir olju og gassi á norska landgrunninum. Tað verður mett at vera sera góð luttøka. Ì seinastu útbjóðingini var talið 37, sum var mett at vera metstór luttøka. Ikki óvæntað er størsti áhugin at leita í Barentshavinum. Hetta kemur ikki heilt óvæntað, sigur Sissel Eriksen, leitistjóri hjá norsku myndugleikunum. Hon vísir á, at eftir at Statoil í fjør fann olju og gass á Skrugard leiðini í Barentshavinum er áhugin fyri hesum stóra og nýggja økinum vaksin munandi. Feløg hava størri og størri vónir til at gera olju- og gassfund í hesum partinum av Arktis. Stóri áhugin fer at varðveita virksemi í økinum og hava við sær, at vit fáa meira at vita, hvat undirgrundin veruliga goymir. Tey 36 feløgini, sum hava søkt um leitiloyvi, eru - Atlantic Petroleum AS, AS Norske Shell, Bayerngas Norge AS, BG Norge AS, BP Norge AS, Centrica Resources Norge AS, Concedo ASA, ConocoPhillips Skandinavia AS, Dana Petroleum Norway AS, Det norske oljeselskap ASA, Dong E&P Norge AS, E.ON E&P Norge AS, Edison International SpA, Eni Norge AS, Faroe Petroleum Norge AS, GDF SUEZ E&P Norge AS, Idemitsu Petroleum Norge AS, Lukoil Oil Company, Lundin Norway AS, Maersk Oil Norway AS, Moeco Oil & Gas Norge AS, North Energy ASA, OMV Norge AS, PGNiG Norway AS, Repsol Exploration Norge AS, Rocksource ASA, RN Nordic Oil AS, RWE Dea Norge AS, Skagen44 AS, Spring Energy Norway AS, Statoil Petroleum AS, Suncor Energy Norge AS, Total E&P Norge AS, Tullow Oil, Valiant Petroleum og Wintershall Norge ASA. Bæði tey føroysku oljufeløgini, sum eru við í kappingini um loyvini, hava dótturfeløg í Norra, sum standa fyri umsóknunum. Nú fara norskir